## DAGSINS MEINING

# Góð tíðindi

Nú meðan svørt skíggj hóast á føroyska búskaparhimmalinum, tendrast okkurt ljósið. Fyribils avtala er gjørd millum nøkur oljufeløg og eitt borifelag um at bora tveir brunnar skamt frá føroyska markinum í summar. Hetta eru góð tíðindi, tó at man ikki skal selja skinnið, fyrr enn bjørnin er skotin. At tveir brunnar verða boraðir í okkara grannalag skal sjálvandi ikki takast sum eitt endaliga gott úrslit her og nú. Tí vit kenna ikki úrslitið fyrr enn báðir brunnarnir eru boraðir í summar. Men bara tað at virksemi verður aftur í økinum millum Føroyar og Hetland er av alstórum týdningi fyri at halda momentum – fyri at hava tingini gangandi.

Teir báðir brunnarnir eru í bretskum øki, men jarðfrøði kennir ikki til politisk mørk. Eitt ella tvey fund fara sjálvandi at gagna Bretlandi, men tey fara so sanniliga eisini óbeinleiðis at ganga okkum og okkara royundum at finna olju á landgrunninum. Brunnarnir verða boraðir heilt tætt upp at markinum, í einum øki, har føroyskir myndugleikar hava í hyggju at bjóða teigar út til leiting í eini komandi útbjóðing seinni í ár.

Tað áhugaverda við hesum boringum er eisini tann sannroynd, at her er talan um eitt lutvíst nýtt og ókent øki, sum liggur rættiliga fitt frá verandi oljukeldunum Foinaven og Schiehallion bretsku megin markið og "Gullhorninum" okkara megin. Man kann siga, at her er møguliga talan um eitt nýtt leitiøki og vónandi verður tað so, at vit um eitt gott hálvt ár kunnu seta navn á tað "nýggja" umráðið sum "Gulløkið fyri norðan". Annað av boriøkjunum í summar hevur tilknýti til Cambobrunnin, sum varð boraður nakað herfyri við góðum úrsliti eftir øllum at døma. Men av tí at einki er komið út alment um brunnin, verða tað so bara gitingar. Tað ljóðar tó, at talan er um eitt fund. Nú skal tað so møguliga bara staðfestast, hvussu stórt tað er. Hin brunnurin skal borast á 61 stigum og skilst millum oljufólk, at tað, sum farið verður eftir í undirgrundini, sær sera áhugavert út. Talan er í hvussu er um annað slag av "play" tvs. boristað enn tað, sum farið er eftir í "Gullhorninum" fyri sunnan seinastu árini. Talan er so eisini um øki, har nógv hevur verið gitt um møguleikar fyri at gera stór gassfund. Eitt slíkt hevði so eisini skundað undir eina útbygging av gassframleiðslu á Atlantsmótinum.

Hesi seinastu góðu tíðindini um nýggjar oljuboringar á Atlantsmótinum koma helst sera væl við hjá okkara oljumyndugleikum, sum enn ikki hava fingið "heilt fast undir fótum", hvat framtíðar bygnaðinum viðvíkur. Vónandi kunnu hesi tíðindini vera medvirkandi til at geva teimum bjartskygni og trúgv uppá framtíðina, sum kanska hava lyndi til at raðfesta oljuleitingina við Føroyar minni, nú eftir naggatódnina, sum hevur verið og er. Sjálvandi eiga vit at vera realistisk, tí tað at tveir brunnar skulu borast, merkir ikki automatiskt, at tú hevur funnið olju og gass. Men tað merkir kortini, at gongd er í og at oljufeløgini hava tiltrúgv til, at møguleikar eru at finna kolvetni. At hetta so fellur saman við eini nýggjari útbjóðing hjá okkum og at tað snýr seg um júst øki, sum liggja uppat okkara komandi útbjóðing, kundi ikki verið meira heppið. So møguliga liggur framtíðar oljuleitingin á landgrunninum nú í hondunum á teimum feløgum, sum fara at bora í summar, og tann sannroynd, at talan er um feløg, sum eru og fara at vera virkin á landgrunninum er enn eitt gott tekin. Ein møguligur glotti í tí annars myrku tíð, sum vísir seg fyri partar av vinnuni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fjølmiðlar og ferðsluvanlukkur

**Anna Rúna Jakobsen**



So hendi tað aftur. Enn einaferð kravdi ferðslan eitt mannalív. Ein av okkara ungu í besta blóma hevur latið lív. Vit standa eftir spyrjandi og hava valla fatað tað, ið er hent. Vit hava hoyrt tíðindini og sæð myndir, men tað merkir ikki, at vit hava fatað, hvussu stóra sorg ein slík vanlukka hevur við sær.

Stutt eftir, at eg hevði hoyrt deyðsboðini, segði onkur, at myndin av bilinum var at síggja á heimasíðu á alnótini. Hevði ilt við at trúgva tí, men mátti tíverri ásanna, at so var. Seinni um dagin var sama mynd nýtt til forsíðu í Sosialinum. Og so er tað, at eg spyrji meg sjálva. Er hetta rætt at gera? Hvar gongur markið? Hvar er etiska markið? Hvør eigur rættin til hesar myndirnar? Hvat við teimum avvarðandi? Skulu tey kunna koma í ta støðu, at fjølmiðlarnir bera teimum deyðsboðini? Hvat verður tað næsta? Fara vit at síggja illa skadd fólk avmyndað á alnótini?

Á middegi dagin eftir hevði Útvarp Føroya stórtíðindi at bera. Tíðindamaðurin var so spentur, at her hoyrdist rættiliga, at hann helt seg hava eina stóra týdningarmikla fløkju at greiða. Og so fingu vit frásøgnina um Alarmsentralin og spurningar vóru settir við, um røtt mannagongd varð brúkt henda morgunin.

Eg eri eg av tí áskoðan, at tað hevur týdning at seta ljóskastaran á tað, ið fer fram í samfelagnum, bæði í orðum og í myndum. Tað hevur eisini týdning at lýsa evni, ið av onkrari orsøk eru torfør at tosa um. Men hvørt til sína tíð. Eg haldi, at framferðin, ið var nýtt í sambandi við hesa vanlukkuna, var ódámlig. Eg veit, at kappingin um at vera fyrst við tíðindum, er hørð, og í hesari kapping verða myndir eisini nógv brúktar. Eg haldi tó, at í hesi kapping verður mangan gloymt, at saman við hvørjum deyðsfalli eru livandi menniskju við kenslum.

Nógv hevur verið tosað um trupulleikarnar við samskiftinum við Alarmsentralin, men eg haldi ikki, at Útvarp Føroya er rætta staðið at viðgera slík álvarsmál dagin eftir, at eitt menniskja er deytt.

Sjálvandi skal hetta málið við Alarmsentralinum takst upp og greiðast. Frá mær fer ein innilig áheitan um at fáa hetta í rættlag, so vit sleppa undan at hoyra tílík tíðindi sum hesi, ið bert gera ilt verri.

# Ein sumbiartúrur

**Sólvit Simonsen**



So vóru vit aftur ein dansitúr í Sumba. Síðan 1973 hava vit verið dansitúrar í Sumba og tað er tað heilt sjáldsama, at man kann siga um túrarnar, at hvør hevur verið betri enn annar. Tú merkir ein sovorðnan hjartaligan blíðskap, sum bara ikki kann skrivast á pappírið.

Vit høvdu sera góða tíð at fyrireika okkum, so einar tólv dagar áðrenn vit fóru bleiv ringt til Strandferðsluna og spurt, um túrurin hjá Teistanum kl. 19.15 kundi flytast til kl. 20.00 sunnukvøld.

Ja, fyrst bleiv spurt umborð á Teistanum og vinarligir sum teir altíð eru, svaraðu teir, at tað var onki í vegin fyri frá teirra síðu, og teir vóru við fyri at gera sum best fyri fólkið í Sandoynni. Men av skrivstovuni hjá Strandferðsluni var svarið, at tað bleiv onki broytt, og skuldu vit koma aftur í Sandoynna, máttu vit sjálv leiga bátin til Skop - unar. Roynt bleiv við illum og góðum, men tað gjørdi alt tað sama. Svarið var liðugt og ferdugt. Hetta meti eg at vera so vánalig service av Strandferðsluni, at tað er ein óbrúkiligur munur á monnunum nú og teimum, sum vóru fyrr.

Tað, sum eg veit um, hevur tað verið roynt at gera tað soleiðis fyri ferðafólkið, at tað kann verða møguligt at koma ímillum uppá ein brúkiligan máta.

Av tí at vit eru noydd at fara yvir um ánna eftir vatni, altso fyrst um Skopunarfjørð til Havnar, og so við Smyrli suðurum, kostar ein bilett av Sandi til Sumbiar 190 kr. Vit vóru 35 fólk, so vit betaltu í bilettum aftur og fram millum 13 og 14 túsund kr. Harafturat máttu vit gjalda 4600 kr. í leigu fyri Teistan um Skopunarfjørð.

Eg royndi eisini at biðja politikarar um hjálp; men har havi eg onki svar fingið enn, tað kemur kanska til næsta val.

Tað hevði verið ynskiligt, at fólkið á Strandferðsluni, sum fæst við ferðaætlanina, kundi gjørt sær tann ómak at fingið tíðirnar hjá ferjunum at passa saman, so man kundi komið aftur t.d. úr Suðuroy sama dag.

Tað kundi verið áhugavert at vita, hvat nýggi landsstýrismaðurin í samferðslumálum heldur um umstøðurnar at gera ein mentanartúr av Sandoynni til Suðuroyar.

Eg eri somuleiðis vitandi um, at B71 seinasta ár mátti gjalda 40.000 kr. í leigu at koma aftur til hús við spælarunum, við tað at tíðirnar úr Suðuroynni og Klaksvík ikki passaðu til tíðirnar hjá Teistanum.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.